# Hillary gav ilt av sær

At amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, hevur bein í nøsini er alment kent, og tað fekk ein studentur í Kenya eisini at vita, tá hann og hansara floksfelagar fingu høvi til at seta Hillary Clinton spurningar, nú hon er í Kenya á vitjan. Studenturin, sum er úr Kongo, vildi hava at vita, hvat maður uttanríkisráðharran heldur um, at kinverjar gera íløgur í Demokratiska Lýðveldinum Kongo. Svarið kom beinanvegin: -Maður mín er ikki uttanríkisráðharri. Tað eri eg, svaraði Hillary Clinton og sendi tí unga studentinum erina sigandi heilsan við eygunum.



# Ov nógvir kamelar

Í Avstralia ætlar stjórnin at senda tyrlur við byrsumonnum inn í óbygd øki at skjóta fleiri hundraðtúsund kamelar, tí teir eru vorðnir ov nógvir í tali. Teljingar vísa, at tað eru umleið ein millión kamelar í Avstralia, men serfrøðingar siga, at stovnurin er tríggjar ferðir ov stórur. Teir hava tí mælt myndugleikunum til at lata menn skjóta meiri enn 600.000 kamelar, men tað vilja djóraverndarfelagsskapir ikki hoyra talan um. Teir fyrstu kamelarnir vórðu fluttir til Avstralia umleið 1840, og teir vístu seg at vera væl egnaðir, tá fólk skuldu ferðast tvørtur um oyðimerkurnar.

# sína

Tað gekk eitt sindur tungt at tosa, tí Jóhan dugdi so lítið av enskum, men hon dugdi framvegis íslendskt, og tað dugdi Johan eisini, tí hann hevði verið nógv í Íslandi.

Tað vísti seg, at mamman fyri nøkrum árum síðan var flutt til sonin at búgva og seinni aftur flutt í eina eldraíbúð í býnum Lebanon.

## Tosaðu saman á íslendskum

Johan tosaði eisini við hálvbeiggja sín í USA, og teir samskiftu somuleiðis á íslendskum. Beiggin var fegin um, at tey høvdu fingið samband.

Hann spurdi mammuna, um til bara at koma at vitja, men hon hevði ikki umstøður at hýsa fólki í síni lítlu íbúð, men amerikanski hálvbeiggin bað hann endiliga koma yvir at vitja, tí hann kundi gista hjá teimum.

Tað gingu tvey ár, og Johan tosaði við konuna, um tey ikki skuldu fara yvir at hitta mammu hansara. Konan legði honum eina við, at fóru tey, mátti hann ikki bera agg til mammuna, tí mamman hevði í sínari tíð heilt vist gjørt tað besta fyri hann.

– Nei, eg var ikki beiskur inn á mammu.



*Johan Thomsen flutti fyri 13 árum síðan til Danmarkar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Mamma!

15. juli í fjør fóru Jóhan og konan til USA.

– Vit flugu tann seinasta teinin við einum lítlum flogfari og komu fram um náttina. Og tá ið vit komu hagar, sat mamma har. Har vóru bara hon, hálvbeiggi mín og kona hansara, sigur Johan.

– Tá ið eg kom inn, rópti eg hart á føroyskum: Mamma. Vit tóku um hálsin á hvør øðrum, fingu ikki tosað, tárini bara runnu. Har sat eg sum 63 ára gamal og slapp fyrstu ferð at halda um mammu mín, sum tá var 87 ár, sigur Johan, sum er ógvuliga rørdur, tá ið hann sigur frá.

Tey sótu bæði leingi og hildu um hvørt annað. Samstundis tosaðu tey um øll hesi árini, og hvat var hent. Hann greiddi frá royndum síni við at finna hana, og at hann hevði ætlað at funnið pápan eisini.

– Hon bað meg um ikki at seta meg í samband við pápa, sum hevi gjørt so ljótt móti okkum. Haraftrat kundu vit ikki vita, hvussu børn hansara fóru at taka tað.

## Einki agg

– Mamma spurdi meg næstan hvønn dag, um eg var ondur við hana, og eg svaraði, at tað var eg ikki. Eg hevði havt tað gott hjá fosturforeldrunum. Hon hevði hinvegin havt tað øgiligt ringt av at vera farin frá mær, sigur Johan, sum so seint í lívinum slapp at kenna móðurkærleikan frá veruligu mammu síni.

Meðan Johan var og vitjaði mammuna og hálvbeiggjan, vóru hann og mamman altíð fyrst á fótum um morgunin, og tey sótu tá altíð hesa løtuna og hildu í hondina á hvør øðrum og tosaðu um alt, sum var hent. Bæði fingu høvi at fáa svar upp á spurningar.

Mamman visti eisini at siga honum, at hann atti skyldfólk bæði í Íslandi og í USA.

– Nú ætli eg mær yvir aftur hvørt ár, tí mamma er komin so langt upp í árini, sigur Johan.

Mamman hevði fingið tveir synir við amerikanska manninum, men annar doyði í ferðsluvanlukku.

## Ein lívlig mamma

Tað er futtur í mammuni, hóast hon er komin so væl til árs. Sonurin er púra villur við Harley Davidsen motorsúkklum, eigur tvær, og mamman koyrir av og á aðrari.

87 ára gamla Katrina úr Hvalba heldur tað framvegis vera stuttligt, tá ið nakað hendir.

Johan Thomsen kundi ikki fáa hjálp frá sendingini Dsporløs at finna mammu sína, men hann takkar trimum fólkum stórliga fyri hjálpina. Tey trý eru systkinabarn mammu hansara Selma Skaalum í Hvalba, systkinabarn hansara Tummas Zachariassen í Vestmanna og konuni Mariu, sum stuðlaði honum í leitingini.



*Meðan Johan var og vitjaði, var motorsúkklutreff, og Katrina var mitt í rokanum*



*Katrina sum ung kvinna*



*Johan vaks upp hjá Dánjali og Olinu Thomsen, sum vóru sera góð við hann*



*Katrina og nøkur ár yngri systkinabarn hennara Selma*